Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Bárður á Lakjuni, løgtingsmaður

Svarari: Sirið Stenberg, landsstýriskvinna í almanna- og mentamálum

Evni: Demensætlanin og demenssjúk undir 67 ár

Spurningar:

1. Hvussu nógv av teimum 14 tilmælunum í demensætlanini fyri Føroyar frá 2015 eru sett í verk?
2. Hvussu nógvir borgarar undir 67 ár eru raktir av demenssjúku pr. dags dato?
3. Hvar liggur lógarásetta ábyrgdin fyri hesum borgarum, og hvørji tilboð um hjálp eru at heinta hjá teimum og avvarðandi teirra?
4. Metir landsstýriskvinnan, at hesi og avvarðandi teirra fáa nóg góða hjálp í lógini, sum er galdandi?
5. Um ikki, hvat metir landsstýriskvinnan so vera tað rætta at gera?

Viðmerkingar:
Undir heitinum "Gloymsk – men ikki gloymd" fingu Heilsumálaráðið og Almannamálaráðið í 2015 handaða eina demensætlan fyri Føroyar. Ein arbeiðsbólkur gjørdi hesa ætlan, ið landsstýrismaðurin í heilsumálum og landsstýriskvinnan í almannamálum settu á heysti 2013. Ætlanin bygdi á álitið "Gloymsk, men ikki gloymd", sum varð skrivað í 2012. Nú skriva vit 2025. 10 ár eru liðin, síðani demensætlanin varð løgd fram, og 13 ár eru liðin, síðani álitið varð skrivað. Tó, so sær støðan framvegis út til at vera ómetaliga trupul og avbjóðandi hjá ikki so fáum. Kanska serliga hjá teimum demenssjúku, ið eru undir 67 ár.

Í november 2024 spurdi Alzheimerfelagið spurningin: Hava politikarar gloymt demensøkið? Felagið royndi at gera vart við støðuna á demensøkinum, nú kommunuval var í hondum. Í skrivinum ger felagið vart við, at tað verður gjørdur stórur mismunur á fólki við demenssjúku, tí umstøðurnar eru so ymiskar kring landið. Felagið skrivar, at tað var ein stórur feilur, tá kommunurnar yvirtóku eldraøkið í 2015, at politiska skipanin valdi at býta demensøkið sundur millum fleiri myndugleikar og geirar við grundarlagi í aldri hjá borgaranum. Henda avgerðin vísir seg at hava stórar neiligar fylgjur – serliga fyri tey yngru við demenssjúku. Og – sigur Alzheimerfelagið víðari – hóast bæði lands- og kommunupolitikkarar siga seg kenna til syndarligu støðuna, so er eingin, sum veruliga ger nakað við tað.

Støðan tykist bæði álvarsom og átrokandi. Fyri at fá greiði á nøkrum viðurskiftum á økinum, so verða hesir spurningar settir avvarðandi landsstýriskvinnu.

Á Løgtingi, 31. januar 2024

Bárður á Lakjuni